# Bóndur hjálpa hvørjum øðrum ígjøgnum kreppuna

**Ímeðan verkfall er, verða nógvir bøndur noyddir at stoyta mjólkina burtur. Men allir bøndurnir í landinum býta tapið javnt ímillum sín, so at ongin missur meir enn annar**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Nú er føroyskar stendur aftur hvítar av mjólk Ímeðan verkfallið er, verða nógvir bøndur noyddir at stoyta mjólkina á sjógv.

Mjólk er undantikin verkfallinum.
Men tað er bara tann vanliga mjólkin. Hinvegin sleppur mjólkarvirkið ikki at gera allar mjólkarúrdráttirnar, tey plaga at gera, so sum hvítu, róma og jogurt.

Samstundis fáa hotell, matstovur og stovnar ikki mjólk.

Sostatt er nógv mjólk til avlops hesar dagarnar.

Av tí sama heintar mjólkarvirkið bara mjólkina frá bóndrunum, sum eru nærmast við sjálvt mjólkarvirkið.

Sostatt noyðast bøndurnir í Suðuroy at stoyta mjólkina burtur.

Sálvur hevur Petur Karl einaferð stoytt 2.000 litrar burtur og sunnudagin stoytti hann aftur 1500 litrar.

Sama skilið hevur verið hjá hinum trimum bøndrunum í Suðuroynni, sum hava mjólkneyt.

Petur Karl av Rana sigur, at av tí at ongir mjólkarúrdráttir verða gjørdir, er nógv mjólk til avlops so hon ska l stoytast burtur undir øllum umstøðum.

– Tað er onki skil í at føra mjólkina norður til Havnar og at stoyta hana burtur har. Tað er nógv bíligari at stoyta mjólkina burtur á staðnum, tí so sparir mjólkarvirkið farmagjaldið.

Hann sigur, at orsøkin til, at bara mjólkin norðanfyri verður heintað í hesum døgum, er tí, at hendan mjólkin er bíligast at fáa til mjólkarvirkið.

Hinvegin ger farmagjaldið, at tað er nógv dýrari at fáa mjólkina úr Suðuroy norður á virkið.

Men hetta merkir ikki, at bøndurnir í Suðuroy verða við sviðusoð og missa allar inntøkurnar, ímeðan bøndurnir norðanfyri sleppa av við mjólkina sum vant.

Petur Karl av Rana sigur, at boð eru komin frá mjólkarvirkinum um at bøndurnir hefta ein fyri allar og allir fyri ein.

Tað merkir, at tá ið verkfallið er av, verður fíggjarligi missurin gjørdur upp og so verður hann javnaður út á allar bøndur í landinum so at allir átaka sær sín part.



*Sunnukvøldið klokkan átta í fjósinum hjá Peturi Karl av Rana: Nú hvítna strendur tí hann hevur júst skrúvað kranan frá so at 1500 litrar av mjólk kunnu renna í kloakkina , út í áina og á sjógv*

Verkfallið:

# Politikararnir skulu halda seg langt vekk

**– Leggur Løgtingið uppí verkfallið, verða tiltøk sett í verk, samdust yvir 20 fakfeløg um á stórfundi mánadagin**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Leggur Løgtingið uppí verkfallið hjá arbeiðarafeløgunum, verða tiltøk sett í verk.

Hetta var greiði boðskapurin frá yvir 20 fakfeløgunum, tá ið tey hittust til stórfund í Havn mánadagin.

Arbeiðarafeløgini høvdu kallað føroysku fakfeløgini á fund í Havn mánadagin at viðgera støðuna á arbeiðsmark naðinum, nú verkfall hevur verið í tríggjar vikur.

Yvir 20 fakfeløg tóku av innbjóðingini.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at talan varum ein góðan fund.



– Arbeiðarafeløgini í verkfalli fingu fullan stuðul frá øllum hinum fakfeløgunum, sigur Ingeborg Vinther.

Men hon sigur eisini, at greiði boðskapurin á fundinum var, at hetta er eitt stríð, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu avgreiða sjálvir. Greiði boðskapurin á fundinum var, at hetta er eitt stríð, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu avgreiða sjálvir.

– Greiði boðskapurin á fundinum var, at leggur løgtingið uppí, verða tiltøk sett í verk, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað varð ikki so nógv tosað um, hvørji tiltøk talan kann verða um.

Tí veit hon ikki um talan verður um samhugaverkfall, ella onnur tiltøk.

– Tað er skjótt at seta tiltøk í verk, so tað skulu vit nokk koma til, sigur hon.

Ingeborg Vinther heldur framvegis ikki, at Løgtingið yvirhøvur kann leggja upp í verkfallið, so at arbeiðararnir fáa 2,75 afturat um tíman um árið, ella hvat tað verður.

Men tey stúra fyri, at tað er júsat hetta, sum tað kann enda við.

– Tað eru nøkur av okkum sum frykta fyri, at orsøkin til, at semingsuppskotið er so lágt, er nettupp við tí í huganum, at endar tað við, at Løgtingið leggur uppí, fer tingið at gera semingsuppskotið til lóg og tað fara vit ikki at góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

**Koma broytingar í**

Annars høvdu eisini feløgini í verkfalli fund mánakvøldið at tosa um støðuna.

Tá vórðu ætlanir lagdar fyri, hvussu verkfallið skal skipast framyvir, nú onki er hent í tríggjar vikur.

Ingeborg Vinther vil ikki siga, hvat talan verður um.

– Tað einasta, hon vil siga, er, at tað verða broytingar, sum hon tekur til.

Teir næstu dagarnir fara so at vísa, hvat feløgini hava í kvittanum.



# Sum heitt breyð

**Bakaríið hjá Gunleivi bakar meira enn tvær ferðir so nógv breyð sum vanligt. Fólk keypa enn inn undir seg av heimabakaðum rugbreyði**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Fólk keypa breyð sum svøk, tí tað er millum tær fáu vørurnar, sum enn ber til at leggja inn undir seg.

Nú fer gerið skjótt at ganga undan, og bakararnir kring landið fáa ikki bakað í so nógvar dagar afturat. Síðst í hesi vikuni ella fyrst í næstu viku verður helst einki breyð at fáa frá bakarunum.

– Vit baka meira enn tvær ferðir so nógv, sum vit plaga, so vit koyra í hægsta gervi beint nú. Nógv keypa eisini fleiri enn trý breyð, tá tey koma til handils, sigur Christian Nielsen, fyritaksstjóri í bakarínum hjá Gunleivi.



*Kassadamurnar hjá Gunleivi hava úr at gera við at útflýggja breyð um handilsdiskin. Bakararnir hjá Gunleivi baka meira enn tvær ferðir so nógv rugbreyð sum vanligt*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nakrar dagar enn**

Christian Nielsen sigur, at bakaríið fer at baka breyð í nakrar dagar afturat, men nú fer gerið av álvara at ganga undan. Mjøli hava tey tó nóg mikið av.

– Tað er ringt at siga, hvussu leingi vit fara at baka. Tað sær út sum tað aftur er komið panikkur í fólk, og tí er ringt at siga, hvussu leingi vit halda á, sigur hann. Hann leggur tó fólki eina við at vera rólig og ikki keypa alt ov nógv inn undir seg.

Hjá Frants Restorff fara bakararnir eisini at baka í nakrar dagar enn. Roknað verður við, at tey halda á í eina lítla viku.

Í Mylnuni roknar bakarin við, at tey kunnu baka í 8-10 dagar, um sølan verður sum nú, men um fólk aftur fara at hamstra, verður tað sjálvandi skjótari. Trupulleikin hjá teimum er, at hveitimjøl er farið at ganga undan.

**Eingin trupulleiki við grovum**

Úr Mylnuni verður tó sagt, at fullkorns- og sólkjarnubreyð vera at fáa í ein mánað fram í tíðina. Tí er skuldi tað ikki verið nakar trupulleiki við hesum sløgunum breyði.

Ilt er tó at meta um, hvussu leingi breyðið fer at vara, tá fólk keypa inn undir seg á sama hátt sum nú.

Deja Vu farið av landinum:

# Jelling festivalurin fyri stavn

**Bólkurin, sum endaði á øðrum plássi í Prix Føroyum, fór týsmorgunin av landinum at spæla á Jelling festivalinum í Jyllandi. At spæla á slíkum festivali er nakað heilt nýtt fyri teir**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Ein av vinningunum í Prix Føroyum, sum júst er farin afturum bak, var at spæla í Jelling festivalinum í Jyllandi. Fyrireikararnir høvdu umboð á konsertini, og teir valdu síðani ein av bólkunum at spæla á sínum festivali. Teir høvdu frítt val millum allar seks bólkarnar, sum vóru á palli hetta kvøldið.

Deja Vu gjørdist bólkurin, sum skal spæla á Jelling festivalinum. Fríggjadagin skal slagið so standa, tá ungu havnarmenninir fara á pallin.



*Frá vinstru: Rógvi, Flóvin, Líggjas og Rúni (húkandi). Rói vantar á myndini. Fríggjadagin skal bólkurin spæla á Jelling festivalinum á Jyllandi. Hetta var ein av vinningunum í Prix Føroyum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Nýggj uppliving**

– Vit hava ongantíð fyrr spælt á einum slíkum festivali, og tað verður tí nýtt og spennandi fyri okkum, sigur Líggjas Olsen, sum syngur og situr við tangentarnar hjá Deja Vu.

Føroyski bólkurin fer á pallin fríggjadagin tann 30. mai klokkan 19, og teir fáa ein tíma at spæla í.

– Vit spæla mest egin løg. Vit spæla í umleið 45 minuttir við egnum løgum, og so hava vit eisini trý cover løg, sigur Líggjas.

Hóast bólkurin skal spæla á tí minsta av teimum trimum pallunum, so eru teir ikki ónøgdir um hetta. Danski rockbólkurin Big Fat Snake skal spæla ein hálvan tíma aftaná Deja Vu, og tí skuldi nakað av fólki verið til staðar undir konsertini.

Bólkurin hevur einaferð fyrr verið í Danmark og spælt. Tá vóru teir við í eini amatørkapping og gjørdust nummar tvey.

**Ein í Danmark**

Fimm mans eru við í bólkinum. Fýra teirra búgva í Føroyum, meðan tann eini lesur í Keypmannahavn. Tað er gittarspælarin Rói Christiansen, sum býr í Danmark. Teir fýra, sum eru í Føroyum, hava vant í útvarpshøllini seinastu vikurnar.

– Tað er sjálvandi eitt sindur keðiligt, at vit ikki hava verið fullmannaðir undir venjingunum í Føroyum, men vit fara allir at venja saman í tveir dagar áðrenn festivalin, sigur Líggjas.

Bólkurin fer at leggja seinastu hond á fyrireikingarnar á einum háskúla í Jyllandi, har teir hava fingið innivist. Eisini fara teir at spæla eina lítla konsert fyri næmingunum á skúlanum, og tað er góð fyrireiking til tað endaliga brakið.

Limirnir í bólkinum eru Líggjas Olsen (sang og tangentar), Flóvin Viderø (sang og gittar), Rógvi Rasmussen (bass), Rúni W. Højgaard (trummur) og Rói Christiansen (gittar).

Harumframt eru teir tríggir meira garvaðu tónleikararnir Kaj Johannesen, Terji Rasmussen og Jón McBirnie við á ferðini, og teir kunnu óivað geva teimum ungu nøkur góð ráð á vegnum.

Annars kann nevnast, at enski rockbólkurin Status Quo, sum hevur nógv ár á baki, er høvuðsnavnið á festivalinum í ár, sum er í døgunum 29.-31. mai.